## Nógvir politiskir fangar

Ein suðurkoreanskur politikari vil vera við, at minst 154.000 politiskir fangar eru í fongsli ella arbeiðslegum í grannalandinum Norðurkorea. Yoon SangHyun, sum er tjóðartingslimur hjá stjórnarflokkinum GNP, sigur, at sambært einari frágreiðing, sum stjórnin í Suðurkorea hevur latið gera, hava teir norðurkoreonsku myndugleikarnir stongt fleiri arbeiðslegur tey seinastu árini. Hann sigur, at fyri 20 árum síðani vóru tíggju arbeiðslegur við 200.000 politiskum fangum í Norðurkorea. Nú eru seks legur við 154.000 fangum eftir, sigur Yoon SangHyun.



## Iran hartar umheimin

Myndugleikarnir í Iran siga, at onnur lond hava ábyrgdina av yvirgangsálopinum har suðuri í landinum í gjár. 42 fólk doyðu í álopinum, teirra millum fleiri av leiðarunum í teirri máttmiklu Kollveltingarhirðini. Iransku fjølmiðlarnir siga, at talan var um eina sjálvmorðsatsókn, og at sunnimuslimski felagsskapurin Jundollah hevur átikið sær ábyrgdina av atsóknini. Iranska stjórnin sigur, at USA og Bretland styðja felagsskapin og hava tí samábyrgd av tí, sum hendi. Atsóknin var tætt við pakistanska markið, og tí hevur stjórnin har eisini fingið eina heilsan úr Teheran.

# Føroyar hava víst ein ótrúligan vilja til at skerja útlát



**Hetta er ein breið semja, bæði fólksliga og politiskt. Vit kunnu siga, at hetta er ein tjóðarsemja, har eingin er ímóti uppskotinum um skerjing av okkara útláti við 20% fram til 2020 – frá 2005 at rokna, sigur Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum**

UMHVØRVI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í Sosialinum fríggjadagin, segði Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í uttanríkismálum, at ein breið politisk semja er undir landi um skerjing av útláti av veðurlagsgassum.

Landsstýriskvinnan í innlendismálum, Annika Olsen, kallaði til tíðindafundar klokkan 11 í morgun, og tá hesar reglur vórður skrivaðar fyrr í morgun, bendi alt á, at hon á tíðindafundinum fór at kunngera eina breiða politiska semju í Føroyum.

Sum skilst, snýr semjan seg um, at Føroyar vilja binda seg til at minka um sítt útlát av veðurlagsgassum við 20% fram til 2020 – frá 2005 at rokna.

### Føroyar sjónligar

Nú veðurlagsráðstevna verður í Keypmannahavn seinni í ár, og ætlanin er at finna semju um eina altjóða veðurlagsavtalu, hava Føroyar fleiri ferðir sett fram ynski yvirfyri donsku stjórnini um, at Føroyar ynskja eina sjálvstøðuga binding á hesum øki.

Jørgen Niclasen segði fríggjadagin, at arbeitt hevur verið bæði á embætismannastigi – og á politiskum stigi fyri at náa undir land við eini avtalu við danskar myndugleikar.

Vit ynskja, at Føroyar gerast partur av komandi altjóða veðurlagsavtaluni við eini binding, sum tekur atlit til føroysk viðurskifti og er beinleiðis galdandi fyri Føroyar, segði uttanríkisráðharrin.

Tað er uttanríkisráðið við Jørgeni Niclasen á odda, sum stendur fyri sjálvum samráðingunum um bindingar, meðan sjálvt umhvørvismálið, sum ein slík avtala eisini er, liggur undir innlendismálaráðnum, har Annika Olsen er landsstýriskvinna.

### Tjóðarsemja

Tað var ein fegin Annika Olsen, landsstýriskvinna, sum vit hittu í telefonini í morgun fyri tíðindafundin klokkan 11.

Hon vildi ikki siga ítøkiliga, hvat landsstýrið fór at leggja fram í morgun, men vit skiltu á henni, at breiða politiska semjan, sum starvsbróðir og floksfelagi hennara í landsstýrinum, Jørgen Niclasen, sipaði til í blaðnum fríggjadagin, nú er veruleiki.

Hetta er ein breið semja, bæði fólksliga og politiskt. Vit kunnu siga, at hetta er ein tjóðarsemja, har eingin er ímóti uppskotinum um skerjing av okkara útláti við 20% fram til 2020 – frá 2005 at rokna, sigur Annika Olsen.

Hon vísir á, at eingin, sum hevur havt uppskotið til hoyringar, hvørki fakliga ella politiskt, hevur sett seg upp ímóti tí.

Ymiskar viðmerkingar hava verið til uppskotið, og ymisk ynski eru sett fram, men eingin er ímóti. Hetta eri eg sera fegin um, og nú fara vit at samráðast við danir við einari tjóðarsemju aftanfyri okkum.

Annika Olsen avdúkaði tó so mikið í morgun, at allir flokkar taka undir við uppskotinum um 20% skerjing av útlátinum av veðurlagsgassum.

### Tíðin gongur

Tíðin gongur, og nú mugu vit handla skjótt. Vit hava tosað nógv við danir um hetta mál, men eru ikki komin undir land. Nú hava vit so hesa breiðu semju aftanfyri okkum, og við henni fara vit at leggja trýst á danir um, at Føroyar gerast sjónligar í veðurlagsavtaluni.

Annika heldur, at Føroyar við hesi semju rættiliga hava sett sær mál og hava kýtt seg.

Nú verður tað okkara uppgáva at leggja trýst á danir um, at Føroyar vilja verða sjónligar í hesi avtalu. Hvussu vit sum tjóð skulu gerast sjónlig, veit eg ikki rættiliga at siga í løtuni, men tað er hetta mál, vit nú fara at loysa í samráðingum við danir.

Annika Olsen kundi hugsað sær, at Føroyar sum tjóð stóðu undir skjalinum



*Øll hava verið ógvuliga seriøs og tey, sum hava gjørt viðmerkingar, hava verið ógvuliga positiv um saman at finna eitt føroyskt stev, sum ber á mál, sigur Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum*